í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein

## Vánaligir filmar geva pengar

Oscar-vinnarin Al Pacino heldur, at verri filmarnir eru, meira ber til at vinna av teimum. Pacino lesir nógv handrit, og tað eru altíð tey vánaligu, sum kunnu geva pengar.

- Tað er næstan eitt faktum, at verri handritini eru, hægri er lønin. Eitt vánaligt handrit merkir, at tú kanst skora kassan við at spæla í filminum, men eitt veruliga gott handrit kanst tú gloyma alt um. Tá skalt tú verða heppin, um tú ikki sjálvur skalt gjalda fyri at spæla við, sigur Al Pacino.



## Miss á toppinum



Myndamonnum dáma væl at fotografera vakrar kvinnur, og her hevur ein myndamaður hjá AP verið ovarliga í New York við trimum kvinnum. Á myndini síggjast Riyo Mori, sum var Miss Universe í ár, Rachel Smith, sum var Miss USA 2007, og Katie Blair, sum var Miss Teen USA. Og so var lag á manni at taka eina góða mynd ovast í Rockefeller Center við Empire State Building í baksýninum

*Mynd: Polfoto*

## Sjampanjan fleyt

Tað er ein fastur táttur av eini hvørjari kapping við bilum ella moto-súkklum, at vinnararnir fáa handað eina fløsku av sjampanju, so at teir kunnu sproyta sjampanjuna eftir hvørjum øðrum. Á myndini sæst Valentino Rossi úr Italia, sum vann eina kapping í Barcelona farna vikuskiftið. Hann hevur helst vunnið so nógvar kappingar, at hann tímir ikki at sproyta sjampanjuna eftir sínum kappingarneytum. Í staðin legðist hann á kvinnuna, sum hevði handað um sjampanjuna.

*Mynd: Polfoto*




## Rýma úr Hollywood



Tvær av størstu stjørnunum í Hollywood eru Brad Pitt og Angelina Jolie. Tey eru harafturat gift hvørjum øðrum, og nú vilja tey verða við, at tey umhugsa at gevast við at spæla filmar í Hollywood.

- Eg og Brad hava trý børn, og vit vilja gjarna hava fleiri. Men børn krevja tíð, og tað ber ikki til at fáa alt at passa saman. Vit umhugsa bæði at arbeiða í nøkur fá ár afturat, og so fara at brúka meira tíð til familjuna, sigur Angelina Jolie.

## Seyðaríðing



Nógvir eru leikirnir. Seyðasýning er eitt, men seyðaríðing man neyvan verða so vanlig. Men í USA finna tey upp á bæði eitt og annað. Har plaga tey at ríða á illum tarvum, og hesin smádrongur roynir seg á bakinum á einum seyði, sum var ein av kappingunum á Eagle Fun Days Rodeo í Idaho.

*Mynd: Polfoto*

Sosialurin